# Deildarleiðaraskifti á Tryggingini í Klaksvík

**Tilsamans eini hundrað fólk vóru til móttøku mánadagin á deildini hjá Tryggingarfelagnum Føroyar í Klaksvík í sambandi við, at Katrin Sólstein fer frá sum deildarleiðari. Nýggjur leiðari er Kaj Dam**

MÓTTØKA
*Solby A. Eliasen*



*Fráfarandi og nýggi leiðarin á deildini hjá Tryggingarfelagnum Føroyar í Klaksvík. Kaj Dam og Katrin Sólstein*
*Mynd: Arnhold Olsen*

**Klaksvík:** Borðreitt varð við pinnamati, kaffi, hvíttvíni og øðrum góðum til móttøkuna, sum varð hildin mánadagin frá klokkan trý til fimm.

Fráfarandi deildarleiðarin, Katrin Sólstein, hevur starvast á deildini í 19 ár. Fleiri røður vórðu hildnar á móttøkuni. Millum onnur helt eitt av starvsfólkunum røðu fyri Katrini, har ein yrking varð lisin upp. Tað var sera rørandi, og ikki var frítt, at okkurt tárið fall. Tey vóru ovfarin um, at so nógv fólk løgdu sær leiðina framvið hendan dagin. Tað sást best á hjartaligu móttøkuni, sum allir gestirnir fingu, tá tey komu á gátt.

Katrin fylti 65 herfyri, og nú heldur hon, at tað er tíð upp á, at yngri kreftir traðka til.

– Eg verði her í einar fýra mánaðar afturat fyribils, men so fari eg, sigur Katrin.

Hon sigur, at serliga edvskipanin er nógv broytt, síðani hon kom á deildina í 1983.

– Tá eg kom her, høvdu vit onki faks, eina telefon og ein skerm, har vit kundu avgreiða bilarnar. Restin bleiv alt sent til Havnar, sigur hon og smílist.

Deildin í Klaksvík er vaksin spakuliga upp gjøgnum árini. Tá Katrin byrjaði, vóru tey einans tvey starvsfólk. Í dag eru tey væl fleiri enn tað.

Tað koma eisini fleiri fólk á gátt í dag enn fyrr. Tað kemur fyrst og fremst av pakkatryggingini, halda tey bæði, Katrin og Kaj.

– Og so sjálvandi eisini tað, at nú liggja vit við vegin, sigur Katrin. Inntil í 1990 lá deildin ovast í bygninginum, og tað hevði við sær, at viðskiftafólk noyddust at ganga 39 trapputrin, áðrenn tey komu til deildina. Tað halda tey eisini hevur gjørt stóran mun, tí deildin av tí sama er vorðin nógv sjónligari.

### Nærri kundunum

Nýggi deildarleiðarin, Kaj Dam, byrjaði sum bygningssýnsmaður á deildini í Klaksvík í 2000, og nú er hann so deildarleiðari.

Hann sigur, at hann bleiv spurdur, um hann var áhugaður í starvinum í vár. Og hann vil ikki koma nærri inn á nakað, men hann sigur tó, at ætlanir liggja á borðinum fyri at menna deildinar á bygd, og tað millum annað gjørdi sítt til, at hann tók av. Millum annað verður tosað um, at tað skal kunna fara at bera til at avgreiða størsta partin av øllum tryggingarviðurskiftum á deildunum á bygd. Sum er, verður ein partur av tryggingunum avgreiddur í Havn.

– Tað ræður um at koma so nær kundanum sum gjørligt, heldur Kaj.

Hann sær hetta starvið sum eina stóra avbjóðing, og hann gleðir seg til at koma í gongd.

– Eg eri greiður yvir, at tað verður sera nógv ymiskt at seta seg inní, men mær dámar avbjóðingar, sigur nýggi deildarleiðarin hjá Tryggingarfelagnum Føroyar í Klaksvík.

# Klaksvíkar Sløkkilið nýggjan bil

*Nýggi bilurin hjá Klaksvíkar Sløkkiliði kom til Klaksvíkar týskvøldið*




**Týskvøldið kom nýggi sløkkibilurin hjá Klaksvíkar Sløkkilið til býin. Talan er um ein bil, sum millum annað hevur størri pumpur og størri motor enn tann gamli, sum nú er 17 ár**

SLØKKIBILUR
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Onkur í Klaksvík mundi ivast í, um tað var eldur í týskvøldið um áttatíðina, tá sirenurnar frá einum sløkkibili hoyrdust um allan býin. Men so var ikki, tað var tann nýggi sløkkibilurin, sum júst var komin til býin, sum koyrdi við fullum útrykningi niðan til Sløkkiliðsstøðina í Kirkjubrekkuni.

Nýggi bilurin er av merkinum Scania og hevur 350 hesta dieselmotor. Bilurin er bygdur á Scania verksmiðjuni í Svøríki, hevur automatisk gear, og er bygdur heilt í aluminium.

Hædd er tikin fyri verandi tunlum – við tað at bilurin er luftavfjaraður og kann hækkast ella lækkast við einum 15/20 sentimetrum.

Rúm er fyri 6 monnum í bilinum – harav 4 eru roykkavarar. Annars er bilurin sjálvandi útgjørdur við øllum neyðugum ljósum – bæði vanlig og útrykningsljós – bilurin hevur eisini eina 5-6 metur høga teleskopljósmastur, sum verður lyft upp á plássinum, so síggjast kann at arbeiða við teimum 1500 wattunum, sum masturin gevur.

Av hesum bilaslagnum hevur sløkkiliðið í Klaksvík nú 2 bilar. Kári Kjelnæs sigur, at sløkkiøkið er alsamt vaksandi, og eingin veit, nær 2 eldsbrunar verða fráboðaðir samstundis, so nú er bundið um heilan fingur.

– Møguleikar eru jú eisini fyri, at aðrar kommunur í Norðoyggjum koma við í eitt eldsløkkingar-samstarv fyri Norðoyaøkið, tí tað er eingin loyna, at tað er fíggjarliga avmarkað, hvat smáar kommunur megna, sigur Kári Kjelnæs, sum sjálvandi fegnast um nýggja bilin hjá Sløkkiliðinum.

# Málningaframsýning í Runavík

**Hósdagin letur Emma Heinesen úr Klaksvík upp málningaframsýning í gamla handlinum hjá Pidda í Runavík**

LIST
*Solby A. Eliasen*



*Emma Heinesen úr Klaksvík hevur málningaframsýning í Runavík komandi vikuskiftið*

Málningaframsýningin letur upp hósdagin klokkan tvey og verður opin til og við sunnudagin. Hvønn dag frá klokkan tvey til sjey.

Emma fer at sýna fram oljumálningar. Millum annað hevur hon málað náttúruna og gerandisting í einari abstraktari útlegging, sum hon sjálv tekur til. Emma nýtir sterkar litir, hennara málningar bera ikki brá av reinari feminismu, heldur tvørturímóti. Hon hevur fleiri málningar, har ein sær náttúruna, tá hon ordiliga vísir seg fram.

– Mær hevur altíð dámt væl at mála náttúruna, serliga okkurt illveðursligt, sigur Emma.

Hølini, har framsýningin hjá Emmu verður, liggja í einum hugnaligum umhvørvi í Runavík. Emma sigur, at tað stuttligasta við hesum er, at tað kann koma gongd í aftur gamla handilin hjá Pidda.

– Handilshølini hava staðið og bara sagt ger so væl nú í eina tíð. So eg haldi, at tað er so deiligt og hugaligt, at tey kunna nýtast til millum annað eina málningaframsýning, sigur Emma.

Hon saknar eini líknandi høli í Klaksvík, har málningaframsýningar kunnu verða.

– Tað manglar eitt líknandi høli í Klaksvík, tað er ongin ivi um tað. Men tað er óivað torført at finna eini hóskandi høli, sigur Emma, sum tó hevur eini høli í huganum, sum henni dámar avbera væl. Men hon veit onki at siga, um tað verður til nakað. Hon leggur eina við, at eini tílík høli nýtast slettis ikki at vera so dýr og fín.

Emma sigur eisini, at tað verður sølustevna í Runavík um vikuskiftið, so hon vónar, at tað koma nógv fólk á gátt í gamla handlinum hjá Pidda.



# 100 ár síðani Palli Henriksen varð føddur



*Hetta eru foreldrini hjá Palla, Johannes og Angelika. Johannes doyði frá konu og fýra smáum børnum. Tá í tíðini var eingin "Alma". Men Angelika stríddi seg undan sum so mangar aðrar av teimum mongu einkjunum tá í tíðini.*

## Palli spenti víða, men hansara lívsuppgáva var at fjálga um tey veiku í samfelagnum.

2. desember vóru 100 ár síðani merkismaðurin Joen Pauli Henriksen varð borin í heim. Hann doyði í 1980, og var hann tá 78 ára gamal. Vit fara at greiða eitt sindur frá Palla, soleiðis sum vit hava fingið upplýst frá ymsum keldum.

Palli gjørdist faðirleysur longu sum 3 ára gamal. Pápin, Johannes, doyði av vanlukku, gasseitran, umborð á sluppini "Surprice" hjá Vágsbotnhandlinum. Eftir sat mamman við fýra smábørnum, tveimum gentum og tveimum dreingjum og undir umstøðum, sum tá var luturin hjá einkjum - tær beru hendur. Tað hevur verið sagt fyrr her í blaðnum og skal verða sagt aftur. Hóast allar tær føroysku einkjurnar stóðu á berum, tá maðurin fall frá, so megnaðu tær altíð at fáa børnini væl undan. Hesar eru tær veruligu hetjurnar í Føroyum.

Palli gloymdi heldur ikki mammuna. Sagt varð, at tað var neyvan dagur, at Palli antin til ella frá arbeiði, ikki fór inn til mammuna á Áarvegnum. Hann vísti henni stórt takksemi, mammuni, sum hevði verið alt fyri hann í uppvøksrinum.

So tað var ikki so løgið, um Palli gjørdist javnaðarmaður, so hann kundi berjast fyri at bøta um umstøðurnar hjá teimum, sum komu soleiðis fyri.

### Álitismaður fyri verkafólkið

Tað var eisini skjótt, at Palli kom uppí arbeiðararørsluna, og sagt verður um Palla, at har hann var, var hann eisini heilur.

Sum álitismaður hjá arbeiðarum fekk hann nógvar uppgávur. Eitt dømi um hetta var sonevnda 1 - oyra verkfallið undir krígnum. Tá var litið Palla upp í hendur at fara til amtmannin at fáa hann at kalla tingið saman. Hetta eydnaðist, og málið hjá arbeiðararørsluni var rokkið á hesum sinni.

Palli sat nógv ár sum nevndarlimur í Havnar Arbeiðsmannafelag. Eitt stutt skifti var hann formaður, og eitt longri skifti var hann skrivari. Hann var eisini nevndarlimur í Føroya Arbeiðarafelag eitt skifti, og hann var grannskoðari í nógv ár.



*Her sæst Palli (t.h.) á eldri árum í einum talvdysti við Thorstein Vilhelm. Thorstein var sera væl kendur í FF-høpi. Hann var næstformaður í Reiðarafelagnum í nógv ár, og hann hevði nógv álitisstørv í hesum sambandi. So hann, sum hevur skrivað hetta, hevur verið á fleiri hundrað fundum saman við Thorstein, sum doyði í 1986.*

Palli varð valdur í býráðið í Havn á lista hjá Havnar Arbeiðsmannafelag í 1941, men aftaná 1952 umboðaði hann Suðurstreymoyar Javnaðarfelag. Hann sat í býráðnum í 28 ár, og formaður var hann í 10-11 ár - fyrstu ferð í 1944.

Petur Christiansen, sum var býráðsformaður um tað mundið, tá Palli doyði, bar honum hetta skoðsmál: "Fólk høvdu álit á Palla og tað við góðari grund. Sjálvur kendi eg Palla mest frá býráðsarbeiðinum, og sjálvt um vit vóru valdir á hvør sínum lista, haldi eg meg tora at siga, at samarbeiðið okkara millum var tað alrabesta. Palli vildi øllum væl. Hann vildi meira, enn hann fekk ígjøgnum. Soleiðis er, tá ein skal samarbeiða við onnur!"

Palli kom á ting í 1939, tá Trond Hansen doyði, og hann varð valdur í 1940, 1943 og í 1950. Hann var tingmaður í 10 ár. Eitt álitisstarv, ið honum varð litið uppí hendur av tinginum, var at gerast limur í appelrættinum, sum virkaði sum landsrættur undir krígnum, tá danska rættarskipanin ikki rakk til Føroya.

Í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag sat Palli sum formaður og nevndarlimur í samfull 24 ár frá 1940-65.

### Virkin á nógvum økjum

Hann var eisini virkin í sjúkrakassarørsluni, og var hann í nevndini heilt frá 1931 og til hann doyði. Palli var ein av høvuðsstuðlunum, tá sjúkrakassin fór at fáa sær egin hús, og hann hevði eisini onnur álitisstørv fyri sjúkrakassan.

Palli arbeiddi fyrst í Sápuhúsinum í 7 ár, síðan 16 ár á mjólkavirkinum og elverkinum. Aftaná tað gjørdist hann bókhaldari hjá Tórshavnar Havn. Sagt verður, at eingin fekk sum hann ávirkað framtøkuna og menningina av hesum stovni fyri býin.

Palli var eisini kendur telvari. Hugin at telva hevði hann frá ungum av, men eisini fann hann í telvingini hvíld frá tí ofta møðsama býráðsarbeiðinum. Hann taldist millum bestu telvarar í Havnar Telvingarfelag og landinum við.

Palli var sum ungur eisini íðin ítróttarmaður. Hann spældi fótbólt við HB, og hann var millum fremstu rennarar.



*Her síggjast pokalar, sum Palli fekk sum telvari.*

### Arbeiddi í tí stilla

Palli fekk tað eftirmæli frá øllum, sum kendu hann, at av lyndi var hann friðarligur og vinsælur, sum stillisliga royndi at virka býnum til frama, og seinastu árini sást hann javnan til gongu í teimum nýggju lendunum í útjaðaranum, áhugaður í tí hann sá, og hann frøddi seg um vøkstur og framgongd.

Palli var giftur við Elisabeth í Snikkarastovu. Hon var honum ein góður stuðul, og livdi heilt upp til leiklutin sum kvinnan aftanfyri mannin. Hon man eisini onkuntíð hava lýtt honum onkur ráð í oyra. Tað verður eisini sagt, at tað vóru ikki nógv, sum tordu at seta Petur M. Dam uppá pláss. Men sjálvt hetta bakkaði Elisabeth ikki fyri.

Tey bæði Palli og Elisabeth fingu børnini Andreas, Arnold, Jonu, Kirstin og Jákup.

Tann, sum hevur verið nærmast at taka arvin upp eftir pápan, er Jona, sum bæði hevur verið í býráði og løgtingi.

### Hanna Lisberg: Palli var álitið Havn

Men fyri at koma aftur til Palla. Sigast kann um hann, at hann hevur verið ein úrmælingur. Tey eru fá, sum hava havt so víttspennandi virkisøki sum hann, og sigur hetta nógv um mannin. Ein av teimum, sum kendi Palla sera, væl var Hanna Lisberg. Tey hava bæði verið virkin í sovæl fakfelagsrørslu sum politikki. Tað er ikki mark fyri, hvussu høgt Hanna setur Palla. Hon sigur, at hann var álitið í Havn. Ein avtala við Palla var nakað sum roknast kundi 100% við. Við sínum hóvliga sinnalagi var hann altíð tann, sum slættaði sjógv, eisini tá ósemja kundi vera innanfloks. Tað kom ikki fyri, at Palli segði nakað ringt um nakran. Hann var hugsjónarmaður fram um nógvar. Tað, sum hann gav frá sær, var ikki smávegis. Men sjálvur kravdi hann einki.

Tí er eisini grund til at minnast hann, nú 100 ár eru liðin, síðani hann var borin í heim.

*Óli Jacobsen*



*Her síggjast Palli og Elisabeth við teirra fyrstafødda, hini yndisligu lítlu Jonu, sum var uppkallað eftir abbanum.*



*Jona er elsta dóttir Palla, og er hon uppkallað eftir abbanum. Her kann skoytast uppí, at Hannes í Horni, sum doyði í summar 95 ára gamal, eisini var uppkallaður eftir honum. Teir vóru systkinabørn.*
*Her sæst Jona saman við tveimum fittum gentum, sum hon er abbasystir til. Um tað kann sigast, at politikkur fer í arv, so er tað galdandi fyri Jonu. Hon sigur seg vera fødda inn í flokkin.*



*Hetta er ein einastandandi gomul mynd. Tann lítli drongurin, sum sæst so skilliga, er Palli.*